# Nýmótans Optikbúð

**Reinar linjur og gott pláss og ljós eyðkennir innrættingin í Optikbúðini í Havn, nu hon er flutt í nýggj høli í Bøgøtu í Havn**

NÝGGJ HANDILSHØLI
*Anna V. Ellingsgaard*
anna@sosialurin.fo

Tað sæst alt fyri eitt, at eitt professionelt eyga hevur verið uppi í leikinum í nýggju Optikbúðini, sum lat upp í Bøgøtu í Havn í leygardagin. Litirnir eru hvitir og gráligir, meðan glas, spegl og stál setur sín serliga dám á innrættingin.



*Poul Einar Kruse, eigari av Optikbúðini, gleðir seg til at bjóða viðskiftafólkunum munandi betri umstøður í nýggju hølunum*




*Leygardagin lat Optikbúðin upp í nýmótans hølum í nýggjum bygningi í Bøgøtu 5 í Havn*

**Nýtt konsept**

- Vit valdu at lata ein av førandi serfrøðingunum á økinum hjálpa okkum vit innrættingini. Bæði fyri at fáa sum mest burturúr hølunum, men eisini fyri at raka ein heilt ávísan, nýmótans stíl, sigur Poul Einar Kruse, eigari av Optikbúðini. Tað er danska fyritøkan EM inventar, sum saman við eigaranum hevur staðið fyri innrættingini. Úrslitið er dømi um eitt av nýggjastu konseptunum innan handlar av slíkum slag, har reinar linjur, góðska og góð ljósseting eru eyðkenni.

Í nýggja handlinum er eisini kanningarrúm og toilettir á niðaru hæddini, umframt eitt rúm, har starvsfólkið kann gera smærri umvælingar. Á ovaru hæddini er skrivstova og verkstaður, men væntandi verður enn eitt kanningarrúm tókt har um ikki so langa tíð

**Brillumóti**

Burtursæð frá nýmótans sniðnum og litunum, er størsti munurin annars frá gomlu hølunum, at í nýggja handlinum er munandi betri pláss bæði at sýna brillurnar fram og hjá viðskiftafólki at geva sær góðar stundir at royna tær.

Spurdur um ávís mótarák eisini gera seg galdandi innan brillur, sigur Poul Einar, at tað gera tey avgjørt, hóast mótin hesum økinum ikki skiftir so skjótt, sum eitt nú klædnamótin.

- Tað er ongin ivi um, at tað eru merkivørurnar, sum eru 'in' fyri tíðina. Serliga eru tað merki sum Versace, Prada, Dolce Gabana og Ray Ban, sum er millum best umtóktu brillustellini í løtuni, sigur Poul Einar Kruse.



*Nýggja Optikbúðin er innrættað eftir allar nýggjasta konseptinum innan handlar av hesum slagi*

## Harðskapur og rúsdrekkakanningar

Kanningar fyri rúsdrekkakoyring og ein tilburður av harðskapi hava merkt arbeiðið hjá løgregluni í Klaksvík og Runavík um vikuskifti

Frá politinum í Klaksvík verður sagt, at ein persónur varð handtikin leygarkvøldið og skuldsettur fyri harðskap. Arbeitt verður framvegis við málinum.

Bæði politiið í Runavík og í Klaksvík hava gjørt rættiliga nógvar kanningar í vikuskiftinum fyri rúsdrekkakoyring, men ongin bilførari varð tikin fyri at koyra ávirkaður.

Rættiliga friðarligt var annars í Eysturoynni í leygarkvøldið, hóast heilt nógv fólk vóru í býnum í sambandi við, at Global Battle of the Bands konsert var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**- ave**

## Bardagi, herverk og fíggjarsvik

Í Havn endaði ein veitsla við bardaga og herverki fríggjakvøldið, meðan enn ein persónur varð tikin fyri at keypa kartengur av sigarettum í følskum navni

Hóast lítið av fólki var í býnum í Havn fríggjakvøldið, endaði kvøldið heldur buldraliga hjá onkrum.

Á Maskinmeistaraskúlanum endaði ein veitsla við bardaga og herverki, har onkur hurð o.a. fór í sor.

Sama kvøld fekk politiið fráboðan um, at ein persónur var illtonktur fyri at hava framt fíggjarligan undandrátt. Persónurin hevði keypt fimm kartengur av sigarettum í eini kiosk og skriva tær uppá eitt fiktivt felga. Tað eydnaðist politinum rættiliga skjótt at fáa fatur á persóninum, sum framvegis hevði tríggjar kartengur av sigarettum uppi á sær. Hann verður nú skuldsettur fyri fíggjarsvik.

Leygarmorgunin varð aftur boð eftir politinum, tí ein maður hevði gjørt seg inn á tríggjar bilar í Nólsoyar Pállsgøtu.

Sama morgun vóru tveir bilførarar tiknir fyri rúsdrekkakoyring. Í øðrum tilburðinum var bilurin ikki skrásettur, og hartil hevði bilførarin 0,2 g av hash uppi á sær. Umframt at verða skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring, verður hann eisini skuldsettur eftir lógini um euforiserandi evni.

Leygardagin á døgurða boðaði ein maður politinum frá, at onkur hevði rent hansara bil inn í ein betonggarð í grannalagnum um náttina. Ongin lykil var í bilinum, so onkur hevur eftir øllum at døma ætlað sær at rulla bilin í gongd.

**-ave**

## 20 bilførarar tiknir fyri at tosa í fartelefon

Seinastu tíðina hevur løgreglan í Havn gjørt eitt miðvíst átak at fyri at steðga ólógliga atburðinum við at bilførarar tosa í fartelefon meðan koyrt verður. Bara fríggjadagin vóru tískil 20 bilførarar tiknir fyri at tosa ífartelefon meðan teir koyrdu. Teir fingu allir eina bót uppá 400 kr hvør.

Tað er framvegis bara loyvt at tosa í fartelefon, meðan tú koyrir bil, um tú brúkar oyrasnigil. Nógv bendir nevniliga á, at bilførarar, ið hava tosað í hondhildna fartelefon, hava verið atvoldin til nógvar sera álvarsligar skaðatilburðir í á føroysku vegunum.

**- ave**